Føroya Tele

Starvsfólk til Bókhaldið

Til okkara bókhald verður søkt eftir einum fólki at byrja 1. desember 2000 ella skjótast gjørligt.

Í bókhaldinum eru 9 starvsfólk. Høvuðsuppgávurnar í deildini er umsiting av kreditorum, lønum, kassum og fíggjarbókhaldi.

Uppgávan hjá tí, sum settur verður, er serliga at arbeiða innan kreditorbókhald og annars at luttaka í øðrum uppgávum í deildini.

Tín førleiki:
Tann, ið settur verður, skal hava skrivstovu- ella líknandi útbúgving. Dentur verður lagdur á, at tann, sum settur verður, hevur royndir frá arbeiði við kreditorum og at viðkomandi kann taka ábyrgd og arbeiða sjálvstøðugt.

Tað er eisini ein fyrimunur at hava
- førleika viðv. EDV (á brúkarastøði)
- skúla t.d. merkonom, HH ella aðra viðkomandi útbúgving
- góðan røkjuskap
- góð samstarvsevni

Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í einum góðum, avbjóðandi og mennandi umhvørvi.

Lønin verður sambært avtalu millum Føroya Tele og Starvsmannafelagið.

Gjøllari upplýsingar viðvíkjandi starvinum kunnu fáast við at ringja til Martin á Mýruni, deildarleiðara, lokal 3205 ella Heina Joensen, fíggjarstjóra, lokal 3297.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum viðmælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 6. november 2000. Umsóknir skulu sendast til

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

FØROYATELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697

Føroya størsta úrval av
PAKKITILFARI
úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir

Vit útvega eisini:
- * Plastbakkar
- * Pakkibond, tape
- * Merkir, etikettir
- * Knívar
- * Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
- * Ymisk tól til ídnaðin
- * Reingerðisevnir
- * Tilsetningsevnir
- * Plattar
- * Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

...sjálvandi til besta prísin!!

FARPACK

Staravegur 5, P.O. Box 3099
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 35 30 00
Fax +298 35 30 10
E-mail: farpack@farpack.com

Halt **sosialin**

OPIÐ ER AFTUR Á KLAKSVÍKAR DAMPVASKARÍ OG KEMISK REINSARÍ

Tikið verður ímóti toyi á hesum støðum:
Seytjan á Áarvegnum í Tórshavn
Josi á Skála
Jungmann í Rúnavík
Rokoko í Norðagøtu

KLAKSVÍKAR DAMPVASKARÍ OG KEMISK REINS
Nýggjavegur 26 • 700 Klaksvík • Tel. 45 51 60

Norðurlandahúsið í Føroyum

Sí SVF tekstvarp s. 650

Sosialurin - 311820

GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.
NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Til útisetar í Danmark
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað

Danstein
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Skjót levering

Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961

RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN
www.danstein.fo

Keyp myndir

Nú er møguleiki at keypa myndir sum standa í Sosialinum

Kostnaður pr. stk. fyri litmynd:

10x15 cm. kr. 80,-	18x24 cm. kr. 150,-
13x18 cm. kr. 100,-	20x30 cm. kr. 200,-
15x21 cm. kr. 130,-	30x45 cm. kr. 350,-

Fyll henda lepan út.
Klipp myndina út og send hana saman við lepanum til Sosialin.

Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Blað nr.: ____
Síða: ____
Stødd: ____
Mongd: ____

Navn: ____
Bústaður: ____
____
Telefon: ____

Stongt vegna skei›

fríggjadagin 27. oktober

Vegna skei›virksemi ver›ur avgrei›slan stongd fríggjadagin 27. oktober.

Møguligt er at seta seg í samband vi› Arbei›sloysisskipanina á telefaks 34 95 51.

Opi› ver›ur aftur sum vanligt mánadagin 30. oktober.

ALS

Arbei›sloysisskipanin
P.O.Box 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551 • teldupostur: als@als.fo

ítróttur

Nr. 205 • mikudagur • 25. oktober 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Jóannes heldur fram á Toftum

Næstsí›sta leygardag bóru vit tí›indini um, at Hans Fró›i Hansen komandi kappingarár fer at spæla vi› B68 og ikki vi› Sogndal. Tá søgdu vit samstundis, at flestu spælararnir, sum í farna kappingarári hava spælt vi› B68, eisini fara at vera á li›num komandi ár.

Tá var ta› ikki greitt, um Jóannes Jakobsen fór at halda fram í venjarasessinum, men B68 forma›urin, Niclas Davidsen, seg›i seg vóna og rokna vi›, at teir fóru at hava sama venjara.

Nú sigur Niclas Davidsen, at avtala er gjørd millum felagi› og Jóannes Jakobsen um framhaldandi samstarv:

– Ta› eru vit sera gla›ir um. Øll í felagnum hava veri› stak væl nøgd vi› venjaran, og ta› kemur væl vi›, at vit ikki skulu út at leita eftir einum n‡ggjum manni, sum skal setast inn í vi›urskiftini. Í ár vildu vit vera vi› í toppinum, og ta› vóru vit. Máli› ver›ur ta› sama komandi ár, og so mugu vit vóna, at ta› fer at eydnast at koma eitt sindur hægri, enn tri›ja plássi›, sum vit enda›u á í ár.

Ársveitlsan hjá B68 skuldi havt veri› næstsí›sta leygarkvøld, men hon var› útsett. Nú er avgjørt, at ársveitslan ver›ur leygardagin 25. november. Ítróttarfelagi› á Toftum plagar at hava eitt stórt eydnuhjól á hvørjum ári. Ta› er ásett at vera leygardagin 18. november.

jh

Todi dagsins leikari



Todi Jónsson var› kosin sum besti leikarin, tá FCK mánakvøldi› spældi javnt móti FC Midtjylland

Todi Jónsson var› valdur til besta mann á vøllinum, tá FCK mánakvødli› leikti javnleik móti FC Midtjylland

SUPERLIGA
Jákup Mørk

Tá ta› kom til stykkis, skuldu teir úr høvu›ssta›arfelagnum vera fegnir um at fáa eitt stig vi› heim aftur, eftir at teir mánakvøldi› vitja›u FCM í oddadystinum, sum var› vístur beinlei›is á rásini, TV3+.

Javna›u vi› 103

Seinastu 20 minuttirnar noyddist FCK nevnliga at spæla vi› 10 monnum, men kortini fingu teir tá strítt seg upp á javnt.

At ta› tó kom so langt, kunnu teir úr høvu›ssta›num fyrst og fremst takka sær sjálvum, og í ø›rum lagi dómaranum fyri.

Fyrst og fremst var ta› ein brølari av teimum heilt stóru, sum vi›førdi, at heimali›i› fekk lagt seg á odda.

Rune Pedersen í FCK málinum skuldi sparka bóltin burtur tá hann klossa›i solei›is, at Mogens Laursen fekk mál burtur úr at kalla vandaleysari stø›u.

Undan hesum hev›i FCK havt okkurt skot á yvirleggjaran, og eftir ste›gin royndu teir eisini at leggja tr‡st á. Millum anna› raktu bæ›i Todi Jónsson og svenski Pascal Simpson tvørtræi›, men so hendi ta›, sum avgjørt ikki mátti henda.

Í eini álopsroynd var› Christian Lønstrup feldur, og eingin mundi ivast í, at talan var um brotsspark. Floytan hjá dómaranum tagdi tó, og ísta›in fór FCM í mótálop, sum enda›i vi›, at Mogens Laursen púra leysur kundi senda bóltin í FCK neti› fyri a›ru fer› hetta kvøldi›.

Ståle Solbakken gav FCK vónina aftur, tá hann úr 24 metrum sendi fríspark í máli›, men lítla løtu seinni royndi dómarin enn einafer› at køva FCK.

Thomas Rytter, sum hev›i fingi› gult fyri at brúka seg um væntandi brotssparksdómin, nart vall vi› motstø›uleikara, men dómarin metti tó, at okkurt var áfatt, og gav tískil Rytter anna› gula korti›.

Eftir dystin seg›i Rytter seg als ikki skilja naka› av hesum, og sjónvarpsupptøkurnar vístu eisini, at hann hev›i grein í sínum máli.

FCK fekk tó strítt seg upp á javnt, tá Harald Brattbakk sera hegnisliga setti bóltin í neti›, og bjarga›i hann vi› hesum eitt stig til høvu›ssta›arfelagi›. Eitt stig, sum helst átti at veri› tr‡, men sum FCK hóast alt skal vera fegi› um, solei›is sum dysturin forma›i seg.

Todi dagsins ma›ur

Hyggjararnir hjá TV3+ kunnu á hvørjum beinlei›is varpa›um dysti velja dagsins leikara, og hesu fer› fall vali› á Toda Jónsson.

Fram til mi›jan seinna hálvleik var Todi vi› í stórum parti av FCK álopunum, og millum anna› hev›i hann fleiri sera vandamikil álop, eftir at hann var drigin frá beinlei›is mótstø›umanni sínum.

Eisini hev›i hann í fyrra hálvleiki ein solotúr yvir 80 metrar, men hepni var ikki vi› honum, og royndin móti málinum enda›i omanfyri.

Móti endanum av dystinum gingu kreftirnar tó undan, og stutt fyri leiklok var› hann skiftur út vi› Michael Mio Nielsen, tá FCK venjarin heldur vildi binda um heilt og verja einsamalla stigi›.

Annars kann leggjast afturat, at eisini í skriva›u mi›lunum var› Todi mettur sum besti leikari í dystinum, og millum anna› fær hann hjá Ekstra-bla›num eitt flott 10-tal fyri avrik sítt.

Einki er at taka seg aftur í, at teir í FCK eru fegnir um, at føroyski leikarin aftur er tøkur, og fyri A-landsli› okkara er bert at vóna, at gó›u avrikini eisini síggjast aftur, tá lei›in í mars mána›i gongur til Luksemburg og Russland.

Ongland spøkir

Hóast hann enn ikki hevur fingi› nakra ábending frá enska fótbóltssambandinum, ver›ur FCK venjarin, Roy Hodgson, dagliga nevndur sum evni til leysa landsli›svenjarasessin

Ensku sjónvarpsrásirnir royna at venda hvørjum steini í royndunum at finna gó› evni til sessin, men alla tí›ina ver›ur navni› á FK venjaranum nevnt. Ikki tí, ta› er sum so alla a›ra sta›ni enn júst í Onglandi, at hann hevur skapt sær eitt navn, men fjakking hansra hevur eisini givi› royndir. Royndir, sum fleiri a›rir enskir venjarar ikki hava, tí teir ikki hava fingist vi› altjó›a ella útlendskan fótbólt.

Roy Hodgson hevur á›ur veri› venjari hjá m.a. sveisiska landsli›num, sum undir hansara lei›slu fyri fyrstu fer› leikti seg fram til endaspæli› í eini HM kapping. Hetta var í 1994. Eisini hevur hann vant italska stórfelagi›, Inter, umframt at hann í fleiri ár virka›i í svenskum fótbólti.

Undan tilkn‡tinum til FCK var hann tilkn‡ttur Blackburn, sum er einasta roynd hansara vi› enskum toppfótbólti. Fyrsta ári› gekk framúr væl, men sí›ani gekk ni›ur eftr, og endin var›, at Hodgson fekk sekkin.

Vi› ensku fjølmi›lararnar hevur venjarin sagt, at stó› honum í bo›i at gerast enskur landsli›svenjari, hev›i hann sjálvsagt ikki kunna sagt nei. Hann leg›i tó í sama vi›fangi dent á, at hann einki hev›i hoyrt frá enska fótbóltssambandinum hesum vi›víkjandi.

jm